# EYSTUROYAR DANSIFELAG

Tann 7.september 2017

**Skráin veturin 2017-18** **(rættað fyri 19. og 26.januar).**

Vit halda til í Hæddini, Saltangará, vanliga **fríggjakvøld** kl. 21.00 til út ímóti midnátt. Vit kvøða fyrst og hava so ein steðg til kaffi/te og prát, og so verður aftur kvøðið.

Her er skráin fyri veturin, men vit ætla, at hesi nevndu: kvæðir, vísur og tættir verða kvøðin fleiri ferðir gjøgnum veturin – nógv oftari enn skráin sigur - so vit fara at duga væl at kvøða við. Og ikki at forgloyma tað, sum var á skránni í fjør – og slíkt, ið fólk hava hug at kvøða.

Teir flestu tekstirnir eru at finna í kvæðabók okkara á **eystdans.dk** og í kvæðabókunum ANT (Fær. Anthologi), DKF (Danske kæmpe- og folkeviser), GSF (Grør so fagurt), NK 1&2 (Nýggja kvæðabókin) og STF (Stígum fast).

Vertir hava vit sett uttan at spyrja; annars taka øll eina hond í – eisini mannfólkið.

20/10-17 Hin føroyski dansurin, NK1. Ivan.
Teir sigla so væl sín fríða knørr, til 7. ør. Sangbók Føroya fólks, Louis.
Norska løva, STF, Kathrina. Vertir: Nevndin.

27/10 Spanialand og Myklagård, DKF, Sámal P.
Kom upp á fjallatind, Sangbók Føroya fólks, Zacharias.
Veðratátturin, Karstin. Vertir: Jónhild og Erla.

03/11 Vit kvøða brúðarvísur: Várharra hann segði – Høgni; Fisken – Andras; Leivur Øssursson – Sámal P; Kong Hans – Joen Carl; Harra Pætur og Elinborg – Sjúrður Ferjá.
Vertir: Sunneva og Elsa.

10/11 **Barnadansur kl. 20-21**, har vit kvøða slíkt, sum børn duga; í steðginum sodavatn.
Brynhildartáttur, 25 ør., Kristian.
Skrímsla, fyrra helvt, GSF; Hans P. Vertir: Beinta og Pálin.

17/11 Nesbónda tátturin, kopi; Jóannes Dj., ið gevur eina stutta søguliga fráfreiðing.
Teir sigla so væl sín fríða knørr, til 14. ørindi, Louis Vertir: Simona og Turid.

24/11 Hjalmar og Hulda, eystdans.dk, Joen Carl og Sanna.
Snekken liger på landet, DKF, Sjúrður. Vertir: Marjun og Andrea.

01/12 **Táttakvøld**, har vit kvøða lætt: Mimirstátt, O kan du ikke mindes, Melis, Ole Morske, Snorkus, Tevatn og breyð, God nat og farvel, Fótbóltstáttin, Mær dámar bjór osfr.
Vertir: Anna Maria og Kathrina.

08/12 **Strandakvøld**, í Pensionistahúsinum, Heygsstøð 3 á Strondum.
Ungersvend bad sin flikke, Jóna.
Strandatáttur, Joen Carl. Vertir: Kára og tær á Strondum.

05/01-18 Rúdusar vísa, ANT; Kári Sv.
Kom upp á fjallatind, Sangbók Føroya fólks, Zacharias.
Skrímsla, Hans P. Vertir: Tóta og Jenny.

12/01 **Glyvr'Hanusarhús**, Norðragøtu.
Harpuríma, GSF; Anna og Sanna.
Vaagen, STF; Anfinnur.
Runsivalsstríðið, til 46. ørindi; Leivur og Karstin. Vertir: Sanna og Anna.

19/01 **Blíðskaparkvøld**: **Vága dansifelag** kemur at vitja okkum, og vit taka ímóti teimum kl. 21.00 stundisliga. Vit kvøða fyrst og fáa okkum so eina lættari máltíð út ímóti kl. 23, og so verður dansað aftur. Sodavatn og veðrur fáast fyri ein lítlan penga.
Ebbe Skammelsøn, DKF; Joen Carl.
Rúdusar vísa, eystdans.dk; Kári. Vertir: Nevndin.

26/01 **Barnadansur kl. 20-21**, har vit kvøða slíkt, sum børn duga; í steðginum sodavatn og twix.
Kong Sverke, DKF; Høgni.
Jomsvíkingar STF; Sámal P. Vertir: Sonja, Bilha og Aslaug

02/02 **Hugnakvøld** kl. 20.00. Tekning. Hava Føroya fólks við; burturluting: Meira kunning seinni.
Jeg ser så mangt et orlogsskib, DKF; Ivan.

09/02 **Aðalfundur** kl. 20.30 - 21.30; skrá eftir lógini.
Vit minna okkum á ein góðan dansivetur. Vertir: Helena og Anna.

**Nýggjárskvøld** og **fastalávints mánakv.** er opið frá 20.30 til u.l. midnátt, og vaksin gjalda kr. 50,-

K**unning** fáa limirnir pr. e-post, á eystdans.dk og **Eysturoyar dansifelag á Facebook** (opin bólkur).

**Limagjaldið fyri 2017,** kr. 100,- verða limirnir bidnir at flyta í **Bank Nordik, konto 6460 407 961 4**
- helst ikki seinni enn 1.nov. 2017. Viðmerking við gjaldi: egið navn/nøvn. Einki annað!

*Felagið er stovnað í 1969 og hevur til endamáls at savna fólk til føroyskan dans og stimbra áhuganum fyri dansinum. Limatalið er gott og væl 100, og vanlig kvøld eru vit 25 – 40 fólk í dansi.*